VÁGA KOMMUNA

*Mál nr. 19/00673*

*Á býráðsfundi 25. november 2019 samtykti Vága býráð soljóðandi*

# Reglugerð

*fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt*

**§ 1.** Kommunan letur ikki stuðul til umsøkjarar, sum ikki hava heimstað ella bústað í kommununi.

*Stk. 2.* Undantak kann gerast frá ásetingini í stk. 1, um stuðulin í høvuðsheitum verður brúktur í kommununi til endamál, sum koma borgarunum í kommununi til góða.

**§ 2.** Kommunan letur ikki stuðul til virksemi, sum vinnurekandi standa fyri og sum hevur fíggjarligan vinning fyri eyga.

**§ 3.** Kommunan letur ikki stuðul til næmingaferðir.

**§ 4.** Kommunan kann lata rakstrarstuðul til ítróttar- og mentanarfelagsskapir treyta av:

a) At felagsskapurin hevur skipaða limaskráseting og nøktandi felagslóg
b) At felagsskapurin er opin og almennur
c) At felagsskapurin er virkin
d) At felagsskapurin hevur roknskap

**§ 5.** Kommunan kann lata stuðul til einstøk mentunar- og ítróttartiltøk treyta av:

a) At tiltakið er viðkomandi og mennandi fyri borgararnar í kommununi
b) At tiltakið er alment

**§ 6.** Í sambandi við 100 ára føðingardagar hjá borgarum í kommununi rindar kommunan fyri hølir, reingerð og kaffiborðhald.

**§ 7.** Umsóknir um stuðul sambært §§ 4-6 skulu latast kommununi skrivliga og skulu á nøktandi hátt lýsa ítøkliga endamálið við stuðlinum.

**§ 8.** Borgarstjórin hevur heimild til at avgreiða umsóknir um stuðul sambært í hesi reglugerð, tá stuðulsupphæddin ikki fer uppum kr. 2.000,00, tó ikki tá talan er um undantak sambært §1, stk. 2.

*Stk. 2.* Mentunar- og trivnaðarnevndin avgreiðir umsóknir um stuðul, tá stuðulsupphæddin er omanfyri kr. 2.000,00 men ikki hægri enn kr. 30.000,00.

*Stk. 3.* Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 30.000,00 men ikki hægri enn kr. 50.000 kunnu játtast av fíggjarnevndini treytað av viðmæli frá mentunar- og trivnaðarnevndini.

*Stk. 4.* Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 50.000 kunnu játtast av býráðnum.

*Stk. 5.* Avgerðir um at noktað at veita stuðul eftir stk. 1-3 skulu leggjast fyri býráðið til endaliga støðutakan.

**§ 9.** Henda reglugerð kemur í gildi, tá hon er samtykt á býráðsfundi. Samtundis fer úr gildi "Reglugerð fyri stuðul til feløg og tiltøk í Vága kommunu" samtykt á býráðsfundi 26.03.2014.

-*-

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo
www.vaga.fo